*Formaðurin í Uttanlandsnevndini:*

# Framstig at bretar nú vilja brúka hugtakið miðlinja

*-Eg veit ikki, um nøkur kollveltandi broyting er í støðuni hjá bretum í marknaspurninginum, men bara tað, at teir nú eru farnir at brúka hugtakið miðlinja, kann vónandi signalera eitt framstig. Tað havi eg skilt ikki hevur verið teirra strategi fyrr. Ganga teir inn fyri prinsippinum í hesum hugtakinum, so verða teir eisini noyddir til at ganga inn fyri logikkinum í hesum sama prinsippi sigur Helena Dam á Neystabø, formaður í Uttanlandsnevndini*



*Óli Samróð var við at fundi í Uttanlandsnevndini. Her tosar hann við ein av limunum í nevndini.*



*Nakrir av limunum í Uttanlandsnevndini saman við løgtingsstjóranum á fundi í farnu viku*

JAN MULLER
JENS KR. VANG

Uttanlandsnevndin hjá løgtinginum hevði fund í farnu viku. Á skránni var kunning. Helena Dam á Neystabø sigur, at tey fingu nakrar frágreiðingar um Schengensamstarvið. Støða skal takast til, um hetta málið er nakað, sum tú bara skal taka til eftirtektar ella um spurningar skulu setast fram í sambandi við hetta málið. Tað sær ikki út til, at málið reisir teir stóru spurningarnar. Møguliga verða viðurskiftini fyri okkum tey somu sum nú. Schengensamstarvið snýr seg um passeftirlit. Ikki øll ES lond eru við í hesi avtalu. Eitt nú er Bretland ikki við, og tí skulu vit framvegis vísa pass har. Limirnir í Uttanlandsnevndini fara nú at kunna seg við tilfarið.

Landsstýrið hevur annars boðað nevndini frá, at tað arbeiðir við málinum um viðskiftastovu í Bruxelles. Í tí sambandinum greiddi Óli Samróð nevndini frá, hvørjum hann arbeiðir við á síni viðskiftastovu.

**Biðið Árna Olafsson um viðmerking**

Spurningurin um markið millum Føroyar og Bretland var ikki til viðgerðar sum so, annað enn at nevndin hevði biðið Árna Olafsson, formann í samráðingarnevndini um viðmerking til grein í Sosialinum um, at bretar nú góðtaka at tosa um eina miðlinju sum mark. Tað var bretski orkumálaráðharrin Lord Fraser, sum í røðu til vinnulívsfólk, gjørdi greitt, at nú má miðlinja millum Føroyar og Bretland fáast uppá pláss.

Helena Dam á Neystabø skilir støðuna soleiðis, at her nýtist ikki at verða talan um nakra kollveltandi vend í støðutakanini hjá bretsku stjórnini, tí ein kann eisini seta málið upp soleiðis sum, at orðið miðlinja er eitt vítt hugtak. Nógv av tí, sum hevur verið frammi frá bretskari síðu kann leggjast út sum ein miðlinja. Tað er tí ikki víst, at hetta ger so stórt hol í sjógvin. Eisini tann sannroynd, at bretski orkumálaráðharrin hevur úttalað seg til vinnuna fyrst og fremst og ikki til politisku skipanina, nýtist ikki at tulkast sum annað enn tað.

-Men bara tað at bretar eru farnir at brúka hugtakið miðlinja, kann vónandi signalera eitt framstig. Tað havi eg skilt ikki hevur verið teirra strategi fyrr. Og ganga teir inn fyri prinsippinum í hesum hugtakinum, so verða teir eisini noyddir til at fylgja logikkinum í tí prinsippinum.

**Vóni teir góðtaka at tosa um miðlinju**

-Eg vóni annars, at bretar í komandi samráðingum vilja góðtaka miðlinjuprinsippið.

Formaðurin í Uttanlandsnevndini ætlar sær annars ikki at gera stórvegis viðmerkingar til samráðingarnar, tí hetta er ikki uppgávan hjá nevndini, nú tað er litið eini nevnd at samráðast.

Hon vísir annars á støðuna hjá einum samdum løgtingi um, at miðlinja skal vera mark. Í hesum sambandi vísir formaðurin í Uttanlandsnevndini á, at bretar hava góðtikið eina miðlinju við Noreg, so tað skuldi verið lagamanni at gjørt tað sama við Føroyar.

**Uttanlandssiglingin**

Vit hava spurt formannin í Uttanlandsnevndini um uttanlandssiglingin, sum tað hevur verið tosað og skrivað so nógv um í eina tíð, ikki er vorðið eitt mál fyri Uttanlandsnevndina, nú nógv bendir á, at siglingin heilt fer at hvørva!

-Hendir tað, so kundi ein sjálvandi tikið málið upp í Uttanlandsnevndini.

*-Er tað ikki við at henda, og er tað ikki júst tín egni flokkur, sum hevur ábyrgdina av tí í landsstýrinum?*

-Tað er rætt, og vit royna eisini alt vit kunnu at varðveita eitt samskifti við Bretland. Men eg skal viðganga, at kanska sambandsflokkurin og fólkaflokkurin eru ikki so lættir at fáa við uppá tað, men tað er í hvussu er okkara stavnhald, at tann siglingin skal varðveitast.

*-Men kann ein ikki siga, at tykkara flokkur tvørturímóti hevur staðið fremst í avtøkuni av hesi sigling?*

-Nú kundi Teistin ikki blíva við at sigla.

-Men kunnu tit ikki fáa t.d. Smyril Line, sum jú m.a. kann takka tí almenna fyri, at tað er til í dag, og sum tað almenna jú eigur partapening í, til at átaka sær hesa sigling?

-Tað haldi eg tit mugu tosa við landsstýrismannin um.




**SKEIÐ Í GMDSS**
**(eftir nýggju skipanini)**

| | |
|---|---|
| **Skeið nr. 110:** | **Generelt certifikat sum radio-operatørur í GMDSS (GOC)** |
| Endamál: | Endamálið við skeiðnum er at útbúgva navigatørar til at reka og hava ábyrgd av GMDSS-radiostøðum. |
| Innihald: | Arbeiði við radiotelefonistøðum við telexútgerð, Inmarsat-A, Inmarsat-C, DSC (Digital-Sel-Call), NAVTEX, EPIRB, SART, avgreiðslu og galdandi reglugerðir og takstir, umframt »sea-speak«-enskt. |
| Próvtøka: | Skeiðið endar við skrivligari og munnligari próvtøku. |
| Fyritreytir: | Ongar. |
| Skeiðið varar: | Skeiðið varar í 15 dagar (3 vikur), harav 2 dagar eru til próvtøku. |
| Prísur: | kr. 9.700,00. Próvtøkugjald er íroknað. |
| Skeiðbyrjan: | 3. mars og 2. apríl. |

FØROYA SJÓMANSSKÚLI
Postboks 104 FR-110 Tórshavn
Telefon +298-11749 Fax + 298-18122